tíðindablaðið
# sosialurin
Nr. 87 Mikudagur 8. mai 1996 | 70. árgangur | Krónur 7,00

## Tollfrítt í Rúsuni:




**Duty Free stendur á fløskunum, men sæst ikki á prísinum**

Síða 6



## Skipasmiðjan Føroyar á Skála:

# Vann í kapping við útlendskar skipasmiðjur

*Grønlendski rækjutrolarin Amerloq, fyrrverandi Sólborg, kom í gjár í dokk á Skála. Skipið skal eftirhyggjast og umvælast fyri 2,5 milliónir krónur. Skipasmiðjan Føroyar hevði bíligasta tilboðið*

Síða 3

## Lassie fann hash í Vágum

Síða 4



## Western sannført:

# Føroyska undirgrundin kann goyma olju

*Myndin sýnir umboð fyri heimsins størstu seismikkfyritøku framman fyri heimsins elsta ting.*

Síða 8-9

*Heimsins størsta seismikkfyritøka brúkt 60 mill. kr. uppá føroyska undirgrund:*

# Føroyska undirgrundin kann goyma olju

*Føroyaleiðin og alt økið á Atlantsmótinum teljast millum tey øki í heiminum í dag, sum oljuvinnan hevur størstan áhuga fyri og tí vil gera stórar íløgur í heldur kanningarstjórin hjá Western, Gavin Hills-Jones, sum hevur vitjað í Føroyum*

Jan Müller

Heimsins størsta seismikkfyritøka, tann amerikanska Western Geophysical hevur [illegible] í føroysku undirgrundini.

[illegible] 60 mill. kr. [illegible] tinginum.

Vit eru nøgdir við arbeiðið og vóna at hetta kann vera fyrireikingum til [illegible] seinni í nýggjari røðunum at finna olju og gass í undirgrundini sigur Gavin Hills-Jones, stjóri í Western, sum saman við trimum av sínum starvsbrøðrum júst hevur vitjað í Føroyum og her handað oljufyrisitingini úrgreiðingina.

Western-stjórin er sera væl nøgdur við samstarvið við føroyskar myndugleikar og heldur fyri at umstøðurnar hjá oljufeløgum at virka á hesum leiðum eru sera góðar.

**Oljufyrisiting væl nøgd við Western**

Eisini leiðarin á Oljufyrisitingini, Martin Heinesen er nøgdur við samstarvið við Western.



Tey fýra umboðini fyri Western her framman fyri tinghúsinum. Stjórin fyri nýggjum kanningarøkjum Gavin Hills-Jones nr. 2 frá høgru. Steve Butler nr. 2 frá vinstru hjá honum. Hinir báðir hava staðið fyri tí tortøra tekniska arbeiðinum at viðgera og tulka seismikkin. Mynd Jan Müller

Eg haldi, at vit kunnu vera væl nøgdir, tí Western hevur við sínum tekniska megnað at fáa bilbukt eina stóra forðing – barrieru nevniliga at kunna síggja niður gjøgnum tjúkku basaltflatirnar.

Úrslitið av arbeiðinum hjá Western sigur greitt, at her er talan um strukturar og grótsløg undir basaltinum, sum vert er at arbeiða víðari við.

Stjórin hjá Western heldur ikki, at tað við verandi kanning ber til at svara spurninginum, antin olja er í undirgrundini ella ikki.

Hann endurtekur tað, sum flest allir oljusérfrøðingar siga, nevniliga at bert ein boring kann avísa, um olja er til.

Men kanningar okkara, sum fevna um alt tað føroyska økið, vísa týðuliga, at tað eru strukturar undir basaltinum, sum eru verdir at hyggja nærri at. Teir eru nevniliga ein høvuðsfortreytin fyri at kunna finna olju.




Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini við einum dýrum gripi. At gera tilfarið í hesum fýra ringbindunum hevur kostað Western 60 mill. kr. Landsstýrið hevur fingið tað ókeypis men kann Western selja tað til onnur. Mynd Áki Hermansen



Tá Føroyar settu hol á oljuleiðina. Seismikkskipið Sea Star kemur á Havnina og fer undir at kanna føroysku undirgrundina. Mynd Jan Müller




Søgulig mynd. Martin Heinesen, leiðari á oljufyristingini og ein av sérfrøðingunum hjá Western her við fyrstu "sendingini" av seismikki av Føroyaøkinum frá 1994. Mynd Jan Müller

